tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.01.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, ~~Kristina Roest~~, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir: Jens Arni Hammerfoss Leo

Ikki møtt: Kristina Roest, fráboða

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/24 | 23/00343-2 | JSS- fyrisp. um gerðabýti |
| **Til kunningar** | | |
| 1/24 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 2/24 | 21/00027-5 | Dugni í Suðuroy |
| 3/24 | 22/00100-3 | Staðarnøvn -skráseting av staðarnøvnum |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til býráðsfundin í dag 25. Januar 2024 og spyr um viðmerkingar eru til hesa. -ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**1/24**
**23/00343-2 JSS- fyrisp. um gerðabýti**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 68/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 17.01.2024 | 6/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.01.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.01.2024 | 1/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2023**
Jens Sigurd Simonsen, stjóri og eigari av sp.f. JSS, hevur vent seg til umsitingina við fyrisp. um kommunan hevur áhuga í at fremja gerðabýti av bygninginum á Havnarlagnum 72, matr.nr 754c á Tvøroyri, ið er ogn hjá sp.f JSS og matr.nr 7f & 7g, á Drelnes, ið er ogn hjá Tvøroyrar kommunu.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Kristin Michelsen mælir til at beina málið í Vinnu- og havnanevndina, einmælt samtykt.

**Vinnu- og havnanevndin 17. januar 2024:**
Nevndin metir ikki, at kommunan í løtuni hevur tørv á bygningin á Havnarlagnum 72, matr.nr 754c. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá vinnu- & havnanevndini.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Borgarstjórin mælir til, at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð í umsitingini, áðrenn vinnu- og havnanevndin tekur málið upp til nýggja viðgerð. Einmælt samtykt.

**Til kunningar**

**1/24**
**23/00044-1 Skattatøl 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 7/23 |
| 10 Býráðið | 19.06.2023 | 18/23 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 8/23 |
| 12 Býráðið | 28.09.2023 | 20/23 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 11/23 |
| 14 Býráðið | 26.10.2023 | 22/23 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 13/23 |
| 16 Býráðið | 30.11.2023 | 24/23 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.12.2023 | 14/23 |
| 18 Býráðið | 18.12.2023 | 25/23 |
| 19 Fíggjarnevndin | 18.01.2024 | 1/24 |
| 20 Býráðið | 25.01.2024 | 1/24 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað. -málið verður beint í býráði

**Fíggjarnevndin 18. december 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 18. december 2023:**
Býráðið er kunnað

**Fíggjarnevndin 18. januar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**2/24**
**21/00027-5 Dugni í Suðuroy**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 11.05.2021 | 14/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 33/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.11.2023 | 80/23 |
| 4 Býráðið | 30.11.2023 | 82/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.01.2024 | 1/24 |
| 6 Býráðið | 25.01.2024 | 2/24 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.05.2021)**

Dugni hevur avgjørt at seta á stovn deild í Suðuroynni, og hevur í hesum sambandi sett deildarleiðara og starvsfólk í starv.

Kommunustjórin og borgarstjórin hava í hesum sambandi samskift við stjóran á Dugna, og mæla til at starvsfólk hjá Dugna í Suðuroynni fær atgongd til skrivstovu og goymslu hølið hjá Tvøroyrar kommunu fyri at koma í gongd við virksemið.

**Sosiala nevnd 11. maj 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 27. maj 2021:**
Kristin Michelsen mælir til at Dugni fær innivist hjá Tvøroyrar kommunu fyribils til 31.12.2020. Har eftir verður málið tikið upp til nýggja viðgerð.
Einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 2. nov. 2023:**
Dugni hevur fráboða, at tey ynskja at koma suður 15. nov, at møtast við TVK, fyri at endurskoða teirra staðseting í Suðuroynni, við atliti til at leiga hølir til teirra virksemið í Suðuroynni... Upplýst verður, at virksemið hjá Dugna í Suðuroynni, er komið á fíggjarlógina, og er ynskið hjá leiðsluni í Dugna, at leiga hóskandi hølir í Suðuroynni, og harvið fáa støðugar og fastar karmar at húsast.

Dugni hevur eftir vitjan hjá Tvøroyrar kommunu hin 15. nov. sent eina umsókn um leigu av  Pakkhús 5 til virksemi við endurbúgving, og er ynskiligt at flyta inn í karmarnar 01. Jan 2024.

**Fíggjarnevndin 28. november 2023:**
Einmælt samtykt at borgarstjórin samskiftir við Dugna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

**Býráðið 30. november 2023:**
Málið var umrøtt og kunna. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinnum fundi.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2024:**
Einmælt samtykt fyriliggjandi leigusáttmála dagft. 11. jan. 2024.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**3/24**
**22/00100-3 Staðarnøvn -skráseting av staðarnøvnum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 13/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 17/22 |
| 3 Býráðið | 22.02.2022 | 13/22 |
| 4 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 33/22 |
| 5 Mentanarnevndin | 25.08.2022 | 71/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 15.01.2024 | 1/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.01.2024 | 2/24 |
| 8 Býráðið | 25.01.2024 | 3/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 8. Februar 2022**
Forkv. í Mentanarnevndini hevur heitt á umsitingina um at seta málið um stuðul til skrásetan av staðarnøvnum á skrá.

Umsitingin hevur viðgjørt hetta sama mál í jan. 2021, tá umsøkjarin var boðin á fundi við tekniskudeild/Lasse Jensen, sum kunnaði umsøkjaran um skipanina, ið Tvøroyrar kommuna brúkar til skráseting, har m.a ein kann gagnnýta ókeypis korttilfar og dátur frá Umhvørvisstovuni.

Umsøkjarin ynskir ikki at brúka forrit sum kommunan frammanundan brukar til skráseting/GIS-skipan, men heitur á kommununa at keypa forrit frá fyritøkuni MUNIN, til at skráseta staðarnøvn.

Kommunustjórin hevur samskift við Lassa Jensen um ætlanina, og mæla vit til, at kommunan tryggjar sær øll rættindir til innheinta data, og at hesi vera avrita og latin umsitingini regluliga, og at hesi data kunna koyra saman við skipan, hjá Tvøroyrar kommunu.

**Lógargrundarlag:** Játtan er ikki avsett til hesa skipan, og má fíggjast á FÆ2022, §522, stuðul til mentan.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Samb. umsøkjara er íløgu kostnaðurin kr. 14.000,-, og rakstarkostnaðurin kr. 5.000,-/ár.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. februar 2022:**
Einmælt samtykt, at veita neyðuga útgerð til skráseting av staðarnøvnum, við tilmælinum hjá kommunustjóranum og KT umsitara Lassa Jensen.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 22. februar 2022:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at málið verður viðgjørt sum lukka mál.
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Aniti Vibergsdóttir
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen.
Ímóti eru: ongin
Blankt: Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest.
Einmælt samtykt, at beina málið aftur í mentanarnevndina, har tekniskadeild greiðir nærri frá um ætlanina

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Lasse Jensen var á fundinum og greiddi frá hvussu skrásetingin hjá Tekniskudeild fyrigongur. Lasse Jensen mælir til, at um Mentanarnevndin ynskir at stuðla skráseting av staðarnøvnum, eigur Tvøroyrar kommuna at tryggjar sær atgongd til øll rádata sum vera skrásett.
Málið verður tikið upp til viðgerð á einum seinnum fundi í Mentanarnevndini.

**Mentanarnevndin 25. august 2022:**
Nevndin viðgjørdi málið av nýggjum, og samtykti einmælt ikki ganga at umsóknini um keyp av forriti á møti, og tað eru umsøkjarnir kunnaðir um á fundi.
Skráseting av staðarnøvnum er sambært Løgtingslóg um fornminnissavn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 9. apríl 1964, ábyrgdarøki hjá savninum.

**Kommunustjórin 10. jan. 2024:**
Form. í mentanarnevndini, Bjarni Hammer hevur samskift við áhugapersónar fyri skráseting av staðarnøvnum í Suðuroynni, og ynskir at nevndin tekur málið upp til nýggja viðgerð.

**Mentanarnevndin 15. januar 2024:**
Bjarni Hammer mælir til at loyva áhugabólkinum fyri staðarnøvnum, at skráseta staðarnøvn í verandi skipan, sum Tvøroyrar kommuna brúkar til skráseting av tekniskum lutum í samráð við teknisku deild. At Tvøroyrar kommuna útvegar ein iPad til endamálið, og at kommunan fær rættin til skrásettu staðarnøvnini. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini 15. jan. 2024, har kommunan tryggjar sær øll rættindir til innheinta data, og at áhugabólkurin fyri skrásetan av staðarnøvnum regluliga avritar dátur, sum vera latin umsitingini regluliga, soleiðis at hesi data kunna koyra saman við verandi skipan hjá Tvøroyrar kommunu. Tekniska deild samskipar ætlanina.

**Býráðið 25. januar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:55

______________________________

Kristin Michelsen

______________________________

Anita Vibergsdóttir

______________________________

Alvi Mortensen

______________________________

Jónleyg Jespersen Bech

______________________________

Bjarni Hammer

______________________________

Jens Arni Hammerfoss Leo

______________________________

Eyð Jóna Eidesgaard